Anfinn, Eyðgunn, Magni og Bjørn sum løgmenn og fíggjarmálaráðharrar

BJØRT SAMUELSEN
løgtingskvinna

Eingin stjórn, sum hevur havt eitt heilt ár at gera eina fíggjarlóg, og harvið vísa hvat hon vil, hvønn politikk hon vil raðfesta, kann forsvara at leggja fram eitt fíggjarlógaruppskot, sum stjórnin sjálv ikki stendur aftanfyri. Hon eigur at leggja kongin í somu løtu, hon ásannar, at hon ikki megnar at stýra

Tí hesa heldur ørkymlandi yvirskrift – tað er nevniliga latið upp í hendurnar á limunum í fíggjarnevnd Løgtingsins at siga, hvussu raðfestast skal á fíggjarlógini fyri 2010.

Tað kann ikki sigast greiðari enn við orðunum hjá Jørgeni Niclasen í tíðindasendingini hjá Kringvarpinum 1. oktobur: Landsstýrið kláraði ikki at semjast um eina fíggjarlóg, tí er tað at "samgongan uppi í løgtinginum má finna endaligu semjuna um býtið". Uttan at blunka viðgekk hann, at landsins leiðsla hevur verið noydd at spæla bóltin niðan í Løgtingið – ikki til at justera og gera smærri broytingar. Nei, tað er har avgerðirnar um hvørjar tær stóru raðfestingarnar skulu vera, og harvið eisini hvørt hendan samgongan skal reka ein ávísan politikk – ella ein heilt annan.

Hetta er enn ein váttan um, at ABC er stjórn sum ikki stjórnar, men bert administrerar, uttan felags kós ella greið hjartamál. Tí eydnast tað heldur ikki stjórnini at raðfesta, tí hvussu raðfestir man ein politikk, sum ikki er til?

Í fjør – fyrsta fíggjarlógin hjá hesi samgongu – var uppgávan at raðfesta eisini latin løgtingsins fíggjarnevnd. Tá var haldbar grundgeving, at skotbráið at gera fíggjarlógina var sera stutt (eisini hóast ABC hevði sitið í 4 ár stutt frammanundan, og sostatt átti at kent sínar raðfestingar).

Men hesaferð hevur landsins stjórn havt eitt heilt ár til at vísa hvønn politikk hon vil reka. Enn einaferð er tað latið í hendurnar á fíggjarnevndarlimunum. Og við hesum er ikki talan um nakra yvirskipaða politiska kós fyri at føra landið framá, men um hvør hevur gløggastu evnini og hvassastu albogarnar at fáa mest í sín part.

Anfinn, Magni, Eyðgunn og Bjørn kunnu, sum samgonguumboð í fíggjarnevndini, hyggja í spegilin og smílast til sín sjálvs sum virkandi fíggjarmálaráðharrar og løgmenn – ja, og kanska andstøðuumboðini Annita, Tobbi og Bill, kunnu gera tað sama.

Útlendingalóggávan og gjørdar avtalur

HELENA DAM Á NEYSTABØ
Javnaðarflokkurin

Nú ið ávíst orðaskifti hevur tikið seg upp um, hvussu nýggja útlendingalógin skal tulkast, fari eg at loyva mær at gera eina stutta viðmerking. Tað var eg sjálv, ið sum landsstýriskvinna í útlendingamálum legði lógina fyri tingið, og tað er einki at ivast í, at júst ásetingarnar um arbeiðsloysisprosentið hevði stóran týdning, tá ið flokkar skuldu taka støðu til málið.

Tað er ein óreingiligur veruleiki, at tá ið útlendingalógin varð linkað á vári í 2008, og latið varð upp fyri arbeiðsmegi úr ES-londum, so varð tað ein treyt, at fór arbeiðsloysið upp um 3,5% í meira enn tríggjar mánaðir, so skuldi heimildin takast burtur, at geva ES borgarum arbeiðs- og uppihaldsloyvi uttan eina langa málsviðgerð. Hetta var eitt krav frá javnaðarflokkinum, sum annars ikki hevði tikið undir við broytingunum í útlendingalógini.

Grundgevingin fyri hesari avmarking í útlendingalóggávuni er sólaklár. Tá ið samlaða arbeiðsloysið í Føroyum hevur verið hægri enn 3,5% í longri tíð, so er arbeiðsloysið uppaftur hægri í útjaðarøkjunum. Tað vil siga at í teimum økjum, har tilveran hjá mongum er treytað av tímaløntum arbeiði. Nú eru vit í teirri støðu, at arbeiðsloysið í landinum hevur verið hægri enn 3.5 % í longri tíð, og vit vita, at trupult er hjá mongum at fáa endarnar at røkka saman.

Tí átti einki at verið at ivast í yvirhøvur. Sjálvandi skal ásetingin og avtalan í útlendingarlógini haldast, og reglan um arbeiðsmegi úr ES-londum skal setast úr gildi. At gera skiftisskipanir fyri útlendingar, sum eru í landinum, og sum hava krav upp á eina virðiliga viðgerð, er sjálvsagt eingin trupulleiki. Tað eiga vit at gera. Tá ið arbeiðsloysið aftur verður lágt, ber til at seta reglurnar um ES arbeiðsmegi í gildi aftur.

So her er bara eitt at gera, og tað er at virða gjørdar avtalur og nýggju útlendingalógina og at fylgja teimum ásetingum, sum løgtingið samtykti á vári 2008.

Viðmerking til kjakið um fíggjarlógaruppskotið

VÁR Í GONG
Javnaðarflokkurin

Fíggjarlógaruppskotið varð framlagt mikudagin . Havi ikki enn havt stundir at seta meg inn í smálutirnar í uppskotinum, men fari við stórum áhuga at gera hetta næstu dagarnar

Tó er longu ein ábending um, at uppskotið í fyrstu syftu peikar rætta vegin, við tað tilvískan um, at vit hava bólkar í samfelagnum, sum hava stóran tørv á hjálp. Ætlanir eru at útbyggja heilsuverk og byggja sambýlir v.m., og er hetta í tøkum tíma. M.a hava tey sálarsjúku so dyggiliga verið ein eftirbátur í okkara vælferðarsamfelag. Eldraøkið er somuleiðis eitt øki, ið hevur stóran tørv á raðfesting. Hetta síðst nevnda hava borgarafundir verið hildnir um og einstaklingar hava gjørt vart við hendan sera stóra trupulleika. Í hesu løtu lýða fleiri av okkara eldru borgarum svára neyð, við tað at teirra heilsustøða er farin at bila.

Vælferðarsamfelagið Føroyar

Hvat er eitt vælferðarsamfelag? At búgva í einum vælferðarsamfelag ljóðar sum ein framvikjarættur. Hetta merkir, at vit umframt hava eitt gott livistøði, eisini verða loftaði um vit gerast sjúk og avlamin v.m. Vælferðarsamfelagið merkir í mínum hugaheimi eisini at tann hjálp og tilboð sum verða veitt, eru á høgum og virðiligum støði. Her haltar Vælferðarsamfelagið Føroyar á fleiri økjum. Undirritaða hevur arbeiðsroyndir frá bæði heimatænastu og røktarheimi, og hevur við egnum eygum sæð, at tey tilboð, sum verða veitt eitt nú heimabúgvandi óhjálpnum fólki, eru av fíggjarligum ávum skrúðaði niður á eitt so lágt bluss, at hesi gomlu bert æna á vatnskorpuni. At betra um teirra lívsgóðsku tykist vera utopi í Vælferðarsamfelagnum Føroyar í dag!

Trivnaðarnevnd Løgtingsins

Lurtaði eftir kjakinum, sum var í útvarpinum hjá Kringvarpi Føroya mikudagin. Har hevði journalisturin sett formannium í Trivnaðarnevndini Jákup Mikkelsen úr Fólkaflokkinum og Eyðgunn Samuelsen úr Javnaðarflokkinum stevnu. Tað fall mær fyri bróstið, at hoyra formannin í Trivnarnevnd Løgtingsins argumentera fyri, hví hann heldur vildi hava raðfest betong enn bleyt virðið. Hann segði millum annað ,at ein av grundgevingunum var, at raksturin var so stórur. Ja, samfelagið hevur eina stóra økonomiska byrðu av at fíggja eitt nú raksturin av eldraøkinum og til tey sálarsjúku, men byrðan blívur ikki minni av at spara og lora á økinum. Hvussu ætlar formaðurin annars at loysa henda trupulleika? Tað ber ikki til at venda blinda eyga til, gamaní orka hesir bólkar illa at blíva við at biðja um hjálp, men fyri okkum fakfólk á økinum er hetta ein kontantur gerandisdagur og vit vilja støðugt vísa á veruleikan. Haldi tað er ræðandi at hoyra slíkar útmeldingar, men at hoyra tær frá sjálvum formanninum í Trivnaðarnevndini ger tað uppaftur meira ræðandi At enda vil eg spyrja, Hvat er uppgávan hjá Løgtingsins Trivnaranevnd?

Mótmælisskriv

Skúlastýrið á Tvøroyri mótmælir harðliga framferðarháttin hjá Tvøroyrar býráð at selja skúlan í Trongisvági til eftirskúla.

Vit harmast um, at Tvøroyrar býráð hevur tikið eina so týdningarmikla avgerð uttan at kunna leiðslu skúlans og skúlastýrið um ætlanina frammanundan.

Skúlans leiðsla harmast serliga um, at býráðið tekur eina so týdningarmikla avgerð uttan at kunna seg um, hvørjar avleiðingarnar avgerðin fær fyri skúlans næmingar.

Tvøroyri 1. oktober 2009

búmerki | lýsingar | faldarar | plakatir | visitkort | myndatøka

grafikmaster
hevur drúgvar royndir innan marknaðarføring og sniðgeving og hevur loyst nógvar fjølbroyttar uppgávur fyri virki og stovnar.

Bryggjubakki 14
FO-100 Tórshavn
Tel. 21 19 96
info@grafikmaster.fo
www.grafikmaster.fo

grafikmaster
...tí snið hevur týdning

fløguhúsar | bannarar | skelti | brævpappír | heildarloysnir